# Arafat og Peres á fundi

**Peres hevur heimild at tosa við Arafat, men heldur ikki meira enn tað**

Palestinski leiðarin, Yasser Arafat, og ísraelski uttanríkisráðharrin, Shimon Peres, høvdu mánakvøldið ein sokallaðan óformligan fund í Bruxelles. Endamálið við fundinum var at endurreisa sambandið millum partarnar, men nakrar samráðingar vóru ikki.

Belgiski forsætisráðharrin, Guy Verhofstadt, sum legði høli til fundin, segði aftaná, at ætlanin var ongantíð, at teir báðir skuldu samráðast um kreppuna í Miðeystri. Hvørki Arafat ella Peres vildu tosa við tíðindafólk eftir fundin.

Fundurin teirra millum vardi kortini hálvan annan tíma. Sambært einum belgiskum stjórnartalsmanni var málið við fundinum at endurreisa álitið millum teir báðar partarnar.

Arafat og Peres hittust á Mallorca fyri nøkrum døgum síðani. Tað var í sambandi við eina ráðstevnu millum londini við Miðjarðarhavið, men heldur ikki tá var talan um nakrar samráðingar.

Peres hevur heldur ikki heimild at samráðast við Arafat. Tað kom fram mánadagin, tá ein ísraelskur ráðharri greiddi ísraelska sjónvarpinum frá, at sjálvandi kundi Peres hitta Arafat, men at hann hevði onga samráðingarheimild.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, segði so seint sum í síðstu viku, at skal Ísrael samráðast við palestinararnar, skal hann sjálvur leiða ísraelsku samráðingarnevndina.

## Damfar selur Fóm ís

TÍÐINDASKRIV

Tann fyrsta november yvirtók DAMFAR sølu- og marknaðarføringina av FÓM- og FRISKO ísum í Føroyum.

Yvirtøkan skal síggjast sum ein broyting í áhugamálunum hjá DAMFAR og P/F Poul Michelsen á marknaðinum.

Nýggja sølu-og marknaðarføringsavtalan ímillum FÓM og DAMFAR fer at hava tað við sær, at enn størri orka fer at verða løgd í at tryggja FÓM-ísi støðuna, sum tann mest seldi ísurin í Føroyum.

P/F Poul Michelsen takkar øllum FÓM-kundum sínum fyri sera gott samstarv øll hesi nógvu ár, og ynskir Damfar tillukku við yvirtøkuni.

Eftir 1. november koma ísbilarnar sum fyrr at røkja kundatænastu, tó við teirri broyting, at sølusamskiftið nú verður við DAMFAR á telefon 359977

## Olivur við Neyst á Tvøroyri

TÍÐINDASKRIV

Gallarí Oyggin á Tvøroyri fer nú at hava listaframsýning við Olivur við Neyst, sum fer at sýna fram akvarel, pastel og litografi.

Framsýningin fer at vara í fýra vikur. Framsýningin letur upp fríggjadagin 9. november og heldur fram heilt til tann 9. desember.

Gallarí Oyggin hevur opið hvønn dag, uttan mánadag frá klokkan 15.00 – 20.00.

## Skutu amerikanska tyrlu niður

Taliban-stýrið í Afghanistan sigur, at teir mánadagin raktu eina amerikanska tyrlu so meint, at hon datt niður. Afghanska tíðindastovan AIP skrivar, at tyrlan misti flogið, men kláraði seg kortini yvir um pakistanska markið, áðrenn hon datt niður.

Amerikansku myndugleikarnir avsannaðu alt fyri eitt tíðindini, men pakistanskir embætismenn váttaðu í gjár, at ein amerikansk tyrla var dottin niður tætt við afghanska markið.

Sjónarváttar við markið greiddu altjóða tíðindafólkum frá, at Talibanhermenn skutu eftir tyrluni, men at hon slapp yvir um markið, áðrenn hon datt niður.

## Spennandi ár í Grønlandi

TÍÐINDASKRIV

Jógvan Arge hevur givið út sættu bókina "Teir tóku land". Bókin snýr seg um føroyskan útróður og fiskiskap í Grønlandi í sekstiárunum og ger burtur úr fleiri dramatiskum hendingum.

Størsti sorgardagurin í Føroyingahavnini nakrantíð var 25. juni 1963, tá ein týskur trolari gekk burtur á veg út úr havnini. 27 mans av trolaranum "Munchen" sjólótust og 24 stóðu undir børu í Føroyingahavnini samstundis. Nógvar gitingar vóru um, hvat var týskarunum at meini.

40 føroyingar vóru í álvarsomum vanda, tá hol kom á farmaskipið "Blik" í ísinum suðuri við Kappan. "Blikur" var á veg til ta nýggju útróðrarhavnina á Eggersoy við útgerð til menninir, sum høvdu tikið land har, og alt fólkið noyddist í bátarnar, teirra millum tvær konur og ein landsstýrismaður.

Skonnartin "Tinganes" sakk inni millum oyggjarnar á Kappanum. Hon skuldi fiska har suðuri tann seinasta partin av túrinum, men sigldi á ein flúr og fór til botns eftir tveimum tímum. Alt fólkið varð bjargað.

Janus Petersen av Miðgerði kom sjálvur annar úr Noregi við línubátinum "Eiriki Jalli". Norska vaktartænastan leitaði eftir honum, men fann hann ikki í mjørkanum. Í Grønlandi kom Janus mestsum í skotbardaga við týska "Kap Farvel", sum fór avstað við línuni.

Í Føroyingahavnini spenti Nordafar seg út við nýggjum flakavirki, har nógv fólk úr Føroyum arbeiddu. Har avreiddu stundum fleiri enn 50 bátar. Tórstein í Skálavík fór at gera um seg við 10-mannafarinum "Grindafossi", og aðrir bygdu upp aftur størri grønlandsbátar.

Prestasonurin Svend Thulesen tók í 1960 við sum stjóri. Hann legði alstóran dent á at effektivisera raksturin, sum bæði fevndi um handil við útgerðarvørum og flakaframleiðslu. Menn tjentu góðar pengar í Føroyingahavnini.

Nýggj útróðrarhavn varð loksins grundað í Grátufjørðinum sunnanfyri Føroyingahavnina, og farið varð at føra fisk úr Ravnsoynni til Føroyingahavnina. Menn settu seg eisini niður á Eggersoy, sum sjálvur Kappin er á, og øll søgan um útróðurin úr Eggersoy frá 1963 til 1966 er at lesa í bókini.

Teir tóku land kostar 299 krónur. Hestprent hevur havt prentingina um hendur, og Anker Eli Petersen hevur teknað permu og kort. Forlagið Tjarnardeild gevur út.

## Jólaboð komið

ÚTGÁVA

*Turið Kjølbro*

Á 61. ári eru Jólaboð komin út. KFUM gevur út, og Guttorm Zachariasen leggur til rættis.

Jólaboð eru fjølbroytt og viðgera ymisk evni. Har eru fleiri siðsøguligar greinir, søgur og yrkingar, sum ymsir høvundar hava skrivað. Inngangin hevur Petur Jacob Sigvarsen skrivað. Teknað myndir til bókina hava Janus Dam Guttesen og Jóannis Kristiansen. Kápumyndin hevur Benny Drewsen tikið. Sett og brotið um hevur Bókadeild Føroya Lærarafelags, prentað og heft hevur Einars Prent. Bókin er 64 síður og kostar 80 krónur.




†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara kæra mamma, vermamma,
omma og langomma

**Karin Petersen**
(f. Høgnesen)
ættað av Norðoyri, búsitandi í Havn

andaðist í heiminum sunnudagin 4. november 2001,
86 ára gomul.

Jarðarferðin verður mikudagin 7. nov. 2001
kl. 14.00 úr Nerija á Skála í kirkjugarðin á Selatrað.

*Familjunnar vegna*

**Kirstin, Olaf, Malan, Torbjørn, Sólbjørg og Rúna**

Tey, ið vilja minnast Karin við blómum ella kransi,
kunnu ístaðin lata eina gávu til Nerija á Skála



# 16 tilboð upp á at byggja nýtt suðuroyarskip



*16 skipasmiðjur kunun koma upp á tal at byggja nýggja suðuroyarskipið. Strandferðslan vil onki siga um tilboðini, men teir eru ikki falnir í fátt eftir at hava latið tilboðini inn, tvørturímóti, sigur Reidar Nónfjall, stjóri*

**Fyri at verja fíggjarligu áhugamálini hjá Landskassanum, vil Strandferðslan onki siga um, hvussu høg tilboðini uppá at byggja nýggja suðuroyarskipið, eru. Men teir eru ikki falnir í fátt, tvørturímóti, sigur stjórin á Strandferðsluni**

SUÐUROYARSIGLINGIN

*Áki Bertholdsen*

Einar 16 skipasmiðjur kring allan heimin hava boðað frá, at tær eru áhugaðar í at byggja nýggja skipið, sum skal setast í suðuroyarsiglingina.

Mánadagin varð freistin úti at lata tilboðini inn. Strandferðslan hevði boðið 25 skipasmiðjum kring allan heim at bjóða upp á nýggja suðuroyarskipið.

Av teimum høvdu 13 Skipasmiðjur latið tilboð inn mánadagin. Men ein skipasmiðja hevði boðað frá, at hon var nakað sein, men skuldi lata tilboð inn í gjár og tvær aðrar skipasmiðjur hava boðað frá at tær fara at lata tilboð inn í næstu framtíð.

Sostatt vera tað 16 skipasmiðjur, sum kunnu koma upp á tal at byggja skipið.

Talan er um skipasmiðjur úr øllum heiminum, heilt úr Korea og Spania til Týsklands og Noregs.

### Halda tætt

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni vil ikki siga eitt orð um, hvussu tilboðini vóru.

– Fyri at verja tey fíggjarligu áhugamálini hjá landskassanum, hava vit gjørt av onki at siga um tilboðini.

Hann sigur, at tað kann koma illa við í eini samráðingarstøðu við tær ymsu skipasmiðjurnar, um tøl leka út áðrenn.

Hann vil tí heldur ikki siga, um tilboðini vóru hægri ella lægi enn tað, sum felagið, Knud E. Hansen, sum hevur projekterað skipið, hevur mett at tað fer at kosta.

Men hann ásannar tó, at teir eru ikki falnir í fátt eftir at tilboðini vórðu latin upp. Tvørturímóti, sigur hann. So kann hvør leggja í tað, sum ein vil.

Nú skulu so øll tilboðini kannast nærri og samanberast. Síðani verða nakrar fáar skipasmiðjur valdar burturúr, sum hava tey áhugaverdastu tilboðini og so verður samráðst nærri við tær. At enda er so ein eftir, sum byggisáttmáli so skal gerast við.

### Hevur skund

Strandferðslan miðjar framvegis eftir at strekkja kjølin í vár.

Men nú hevur tað skund at fáa verklagslógina lagda fyri tingið. Tað er lógin, har Løgtingið gevur landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, heimild til at skriva undir byggisattmálan.

Lógin skuldi langt síðani verið klár, men hon hevur leingi verið til viðgerðar í ymsum stýrum hjá landsstýrinum, tí ætlanin er at finna eina fasta orðing fyri, hvussu slíkar lógir skulu orðast.

Men Bjarni Djurholm, landsstýrismaður segði á miðdegi í gjár, at hon var á veg í tingið og tað skilst, ta tað kann vera nær sum helst, at hon verður løgd fram.


